## DAGSINS MEINING

# Politiskt reinføri

Formaðurin í Tjóðveldisflokkinum hevur tosað um politiskt reinføri, og at ting eru "eftir bókini". Vit hava í løtuni eitt mál, ið man roynir at tiga burtur. Tjóðveldisflokkurin tekur ikki støðu, hóast formaðurin í tingbólkinum Heini O Heinesen sigur, at teir ikki hava álit á landstýrisfólkunum.

Flestu landstýrisfólkini munnu verða væl skikkaði til sessin og gera ivaleyst sítt besta. At nú ivi er sáddur um sjálvan løgmann og ein annan landsstýrismann av einum Tjóðveldistingmanni, uttan at tað fær avleiðingar av nøkrum slag, ger bert, at tað kemur inflatión í løgmans- og landstýrisembætini. Negativu úttalilsini smitta av uppá tey landsstýrisfólk, ið ivaleyst gera sítt arbeiði til lítar, og einki hava, ið ikki tolir dagsins ljós.

Hvussu nógv fólk, kanska serliga ung fólk, hoyrir man ikki siga, at politikarir eru allir líka, sipandi til ivasom mál í fortíðini. Her má nevin sláast í borðið beinanvegin, um alt politikaraálit ikki skal vera fokið.

Allir politikarar eru ikki líka. Teir allarflestu hava ongantíð havt ilt við at skyna á sínum egna og annara. At onkur nú pástendur, at løgmaður hevur ella hevur havt ilt við tað ger, at handlast má beinanvegin. Ikki allar avgerðir eru so skilagóðar í tinginum, men løgtings- og landstýrisfólk flest gera ivaleyst sítt besta og gera tað í góðari trúgv. Býttar ella ábyrgdarleysar avgerðir koma ivaleyst mangan fyri, men tað er ikki ólógligt at verða inkompetentur í bestu meining. Veljarin fær til eina og hvørja tíð tey tingfólk, hann hevur uppiborið.

Fara fólk nú bert at yppa øksl at ákærunum móti løgmanni, so eru vit á einum glíðibana, og demokratiska samfelagið Føroyar fær óbótaligan skaða. Moralska ábyrgdin liggur tungt á tingmonnum, tá løgmaður skal veljast. Ikki má tað verða so, at man vegna eitt mál, sum til dømis fullveldismálið letur sær lynda, at menn óansæð hvat verða valdir í Føroya hægsta sess, bara tí, at man fyri ein og hvønn prís vil sleppa at sita við valdið.

Veljarin er ivaleyst líkaglaður við, um løgmaður kundi sitið við valdið í Zimbabwe ella ikki, men hann vil óivað fegin vita, um løgmaður dugir ella dugdi at kenna mun á sínum egna og annara. Torbjørn Jacpbsen sigur framvegis eitt, meðan løgmaður og varaløgmaður siga, at tað ger hann ikki.

Virðingin fyri politikarum má vinnast aftur við at Løgmaður setir Torbjørn Jacobsen uppá pláss, ellla við at Torbjørn Jacobsen prógvar síni úttalilsir. At sagt verður í bløðunum, at fortíðin ger, at menn í føroya hægstu sessum kunnu trýstast henda og handa veg, er stak ræðandi, og má slíkt afturvísast beinanvegin. Vónandi fer samgongan at handla, og fær formaður Tjóðveldisfloksins nú høvi til at vísa í verki, hvat hann meinar við, tá hann sigur "eftir bókini".

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Búskapurin upphitaður

**Hans Birgir Hansen**
*Mr. Big*

Tað verður talað og skrivað um búskaparliga upphiting í bløðum og elektronisku fjølmiðlunum og úti ímillum manna á kaffistovum, ið vitjaðar verða kring alt landið.

Tað hevur ómetaliga stóran týdning at skunda undir landspolitikkarar at fáa dagføring av lóggávum og skipanum og mannagongdum og kunngerðum v.m.

Tað er ikki minst galdandi at fáa skipa javnvág úti í øllum etableraðum viðurskiftum og fáa skipa netarbeiði við atliti til keyp og sølu av vørum og tænastum.

Tað hevur avgerandi týdning at fáa fjøltáttað virksemi skipað sjálvstøðugt og óheft av øllum lands- og kommunalpolitikki, framíhjárættindum til lívs, ið skapar stættarmun ímillum tey útvaldu og vanliga fólkið.

Tað er avgerandi neyðugt við nýskapanum/-hugsanum á øllum økjum, hvat allir føroyingar skulu gera sær nógv greitt, so vit ikki gerast eftirbátar í dag.

Tað er avgerandi neyðugt at fáa skipað eftirútbúgvingar innan almenna/lands /kommunala/privata/ríkis/umsitingar, sum skjótast eftir summarfrítiðina.

Tað er ikki minst galdandi øll, ið arbeiða innan dagstovnar, skúlar, lærustovnar og verkir og virkir, so øll gerast tilbúgvin og kunnu læra frá sær í dag.

Tað skal sleppast undan umfatandi stagnatiónum, so alt ikki steðgar upp, úti í øllum tí fakliga, ein ger í dag vart við, tá ið ein hugsar um heildarskipan v.m.

Tað er avgerandi neyðugt at fáa alt fjøltátta virksemi tillaga eftir føroyskum viðurskiftum og arbeiðs- og fíggjarorku, og tørvið viðurskiftafólkum.

Og sjálvt kostnaðarstøði kann lækkast munandi hjá øllum ein greiddi í lesarabrøvum í bløðunum.

# Betri umlætting

TÍÐINDASKRIV
*Alzheimerfelagið, Tórsbyrgi 16, 100 Tórshavn*

Alzheimerfelagið frættir fegin frá fólki við royndum frá umlætting, serliga frá teimum við meiningum um, hvussu slík umlætting gerst ein góð uppliving fyri allar partar.

Alzheimerfelagið er komið við í eina norðurlendska verkætlan við svenska heitinum: "God korttidsvård vid demens - bättre livskvalitet". Norðurlendska Ráharraráðið stuðlar verkætlanini, sum skal brúkast til at bøta um umlættingina. Demensfeløgini í Finlandi, Álandi, Svøríki, Noregi, Danmark, Íslandi og nú eisini Føroyum samstarva um verkætlanina. Úrslitið verður ein vegleiðing um góða siðvenju.

Í hesum sambandi vil felagið fegin koma í samband við fólk við demenssjúkum og næstringar teirra við einari meining um, hvat eitt gott umlættingartilboð er.

**Tað noðurlendska samstarvið**

Í Norðurlondum búgva nøkur hundraðtúsund fólk við demenssjúkum. Flestu teirra verða í nógv ár búgvandi heima hjá sær sjálvum. Fyri nógv gevur hetta lívsvirði, so leingi tann sjúki og tey avvarðandi ynskja tað soleiðis. Av og á kemur tað fyri, at næstringarnir hava brúk fyri, at onkur annar tekur yvir eina løtu. Hendan verkætlanin gevur so feløgunum møguleika fyri miðvíst at savna royndir við umlætting.

Á Norðurlendska fundinum í 2001 varð avgjørt at kanna nágreiniliga ta vanligastu siðvenjuna fyri umlætting. Føroyska felagið var fyrstu ferð við á norðurlendskum fundi í ár, og kom tá við í hesa verkætlanina. Meiningin við umlætting eigur at vera at varðveita førleikan hjá teimum, sum hava demens, samstundis sum tey avvarðandi fáa høvi at hvíla seg, savna megi og hava tíð at taka sær av sær sjálvum eina løtu.

**Stirvnir umlættingarmøguleikar**

Sambært teimun norðurlendsku Alzheimer- og demensfeløgunum fáa fólk við demenssjúkum og teirra avvarðandi alt ov lítlan stuðul at vera heima. Umlættingartilboðini eru antin ikki nóg smidlig ella ikki lagað til tann einstaka. Endamálið er at skilja týdningin av góðari umlætting og skal lýsa dømi úr ymsu londunum. Tað eru sjónarmiðini hjá brúkarunum, sum skulu leggja støðið undir eina felags fatan av dygdini.

Í dag kenna nógv avvarðandi órógv á sær, tá ið tey lata teirra demenssjúku á stovn. Hetta kann føra við sær, at tað kann vera torført at gleða seg yvir sína egnu frítíð. Fólk við demenssjúku kunnu uppliva, at umlættingin hevur ikki tey røttu tilboðini. Úrslitið verður, at tey uppliva ikki kensluna av at vera til nyttu og at brúka øll tey evnini, tey framvegis hava.

Tí vil felagið sum nevnt fegin frætta frá fólki við royndum frá umlætting.

# Laksa- & sølutorg í Runavík

TÍÐINDASKRIV
*Kunningarstovan í Saltangará*

Aftur í ár verður skipað fyri stórum laksa- og sølutorgi í miðbýnum í Runavík. Tiltakið verður leygardagin 3. august frá kl. 12:00 til kl. 16:00. Harumframt hava handlarnir í Runavík langan leygardag.

Høvi verður hjá øllum vitjandi at fáa ein ókeypis breyðbita við góðum laksi, sum kokkur ger til á staðnum. Okkurt drekkandi verður til keyps. Eisini hava fólk møguleika at keypa feskan laks heim við.

Nógv áhugavert verður at vitja. Til dømis verður pallur settur upp á torginum, har tónleikur og annað undirhald verður. Eisini verður Café og loppumarknaður á skránni.

Í sambandi við laksa- og sølutorgið verður vegurin frá Deild C út á Kommunuskrivstovuna stongdur.


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Rúnar Reistrup runar@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliassen solby@sosialurin.fo
Ragnhild Ellingsgaard ragnhild@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Páll H. Johannesen pall@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Finnur Justinussen finnur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 4449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Rullandi redaktíonin:**
tel. 220507 tel. 333843
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14.00


**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.







Listastevnan

# Sjónleikur

LISTASTEVNAN
*Tíðindaskriv*

Partur av Lisatstevnu Føroya 2002 eru teir Norðurlendsku Sjónleikaradagarnir, Nordiske Teaterdage, sum hildnir verða annað hvørt ár.

Umframt at skipað verður fyri sýningum, fær rithøvundurin Jóanes Nielsen handaða virðislønina Nordisk Dramatikerpris fyri leikin "Eitir nakað land Week-end?". Føroyskt umboð í samstarvinum er Laura Joensen og Jenny Petersen er samskipari av tiltakinum í Føroyum.

### Leikirnir, sum framfrødir verða eru:

**"There"**
Norski "There", er dansileikur eftir víðagitna Jo Strømgren, sum samantvinnar dans og sjónleik í vakrari og stuttligari framsýning um skeivu fatan okkara av Eysturevropa. Fýra leikarar/dansarar greiða okkum frá russum, soleiðis sum vit halda, at teir eru; menn í vakuum, uttan verulig orð, men við fjølbroyttum ljóðkollasjum. Leikarar og dansarar eru: Jan Ivar Lund, Espen Raboli Bjerke, Thorbjørn Harr, Kyrre Tæxnæs

**"Elektra"**
Svenski "Elektra", sum Uppsala Teater framførir, er klassiskt drama í fløktari nútíð. Henda 2500 ára gamla søgan er latin í fullkomiliga nýggjum 2000-ára ham. Framførslan vísir okkum á, hvussu tað er at liva við fyrndargomlum mentanarkrøvum mitt í nýmótans, vesturlendskum samfelagi. Ein leikur um heiður, hatur og hevnd, morð og moral. Ein leikur um eina familju.

Birgitta Englin er leikstjóri.

**"Hóvliga, Elektra"**
Íslendski leikurin, sum í heitinum eisini sipar til klassisku søguna "Elektra", er sermerktur og óvanligur leikur hjá íslendska Tjóðleikhúsinum, í skapi eftir Hrafnhildur H. Guðmundsdóttir. Leikstjóri er Viðar Eggertsson, sum er kendur í Føroyum fyri uppsetingar í Klaksvík og í Havn. Evnið í hesum leikinum eru viðrskifti millum kvinnuligar sjónleikarar, móðir og dóttir.

Vit fylgja teimum á palli og á stórskíggja, har tær so við og við missa tamarhaldið á støðuni teirra millum.

**"Gunnlaug Ormstunga"**
Svenska leikhúsið Teater Pero framførir "Gunnlaug Ormstungu". Kærleikssøgan millum skaldið Gunnlaug Ormstungu og Helgu Føgru er evnið í hesum dramatiska leiki, sum byggir á íslendsku 1000-ára ættartalvu víkinganna. Spenningurin millum tað uppspunað og veruleikan, tá og nú, og samspælið við áskoðararnar ger framsýningina áhugaverda og øðrvísi. Leikstjóri er Peter Engkvist.

**"Macbeth"**
Norðurlendska verkætlanin, sum byggir á klassiska Shakespeare leikin verður aftur at síggja á føroyskum palli. Leikurin "Macbeth" í uppsetingini hjá Cezaris er sum ein marra; líka ójavnur og leysliga samansettur, ólogiskur og irrationellur sum ein marra. Myndirnar flóta. Menniskjuni ganga aftur og fram og sleppa ikki úr stað. Marran endurtekur seg sjálva endaleyst.

"Macbeth" er bert ein lítil partur í tí stóru mekanismuni - tá ið maktmekanisman er farin í gongd, er eingin vegur aftur.

**"Eitir nakað land Week-end?"**
Føroyski "Eitur nakað land Week-end?" er fyrsti sjónleikurin hjá Jóanesi Nielsen. Fyri handritið fekk Jóanes fyrstu virðisløn í føroysku leikritakappingini, og uppaftur verður hann í ár heiðarður við ikki minni enn Nordisk Dramatikerpris 2002. Virðislønin verður handað týsdagin hin 7. august á setanini fyri Nordiske Teaterdage. Leikurin flytur okkum fram til okkara tíð og heim til egna oyggjasamfelag okkara. Evnið er avbyrgd menniskju, sum ikki megna føroyska gerandisdagin og tí eru á afturlatnari deild á sálarsjúkrahúsi. Leikhúsið Grima framførir og leikstjóri er Eyðun Johannesen.

Tveir barnaleikir verða eisni framførdir á norðurlendsku sjónleikarastevnuni, sum er partur av Listastevnu Føroya 2002. Teir eru:

**"Vinden viskar"**
Tað er svenska leikhúsið Masthuggsteatern sýnir barnaleikin "Vinden viskar".

Í hesum leiki vil leikstjorin Rolf Sossna lýsa ævintýrkendu søgur Aisopos´ á ein livandi hátt. Framførslan, sum er fyri 4-9 ára gomlum børnum, viðgerð spurningin um, hvat ið styrki er. Hetta verður lýst við orðum, rútmu, myndaspæli og gandakynstri. Framførslan verður í Atlantis í Klaksvík.

**"Kópakonan"**
21 føroysk børn framføra søgnina um Kópakonuna í leiki og dansi. Tey er í aldrinum 11-13 ár og eru knýtt at Dramaverkstaðnum hjá Hjørdis Johansen. Tey framføra eina dramatiseraða útgávu av kendu søgnini um Kópakonuna. Í juni mánað vitjaðu børnini World Festival of Children's Theatre í Týsklandi, har tey framførdu "Kópakonuna". Framførslan verður í Mentanarhúsinum í Fuglafirði.

# Listastevnan sett í dag

LISTASTEVNUTÍÐINDI

Í dag, Leygardagin 3. august klokkan 14:00, verður onnur Listastevna Føroya sett i Høllini í Norðurlandahúsinum. Ernst Sondum Dalsgarð leggur fyri við at framføra verkið "Bara at vera", har Niels Uni Dam eigur orðini og Tróndur Bogasson tónleikin. Síðani býður Birgir Kruse formaður í stýrinum vælkomin og Heðin Mortensen næstformaður í Umboðsráðnum setir stevnuna. Báðir handa komandi formonnunum, Helgu Hjörvar og Karini Kjølbro, ávegis reglugerð fyri Listastevnu Føroya. Síðani syngur Elsa Waage "Erdas Warnung" og "Traume" eftir Richard Wagner. Tórshavnar Manskór við nærum 40 sangarum framførir undir leiðslu av Bjarna Restorff "Regin Smið" við paukum og elgittara, sum áviksvíst Kára Olsen og Ólavi Jacobsen leika á. Týsdagin byrja Norðurlandsku Sjónleikaradagarnir, sum eisini eru partur av Listastevnuni. Í hesum sambandi framførir føroyska umboðið í norðurlendska sjónleikarasamstarvinum, Laura Joensen, røðu. Eftir røðu hennara, verður vinnarin í leikritakappingini um besta útvarpsleikin kosin. Seinasta hálva tíman av setanini eiga seks føroyskir sniðgevar - designarar - sum við modellum, tónleiki og ljósi fara at sýna fram tað nýggjast innan mótadesign. Tilsamans varar setanin hálvan annan tíma.